Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sirið Stenberg, løgtingsmaður

Svarari: Helgi Abrahamsen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: SEV

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaðurin, at SEV ikki skal kunna bjóða til komandi vindorkuútboð ?
2. Um ja, er semja millum Kommunufelagið, SEV og landsstýrið um hesa ætlan ?
3. Hvørjar lógarbroytingar ætlar landsstýrismaðurin at fremja á elveitingarøkinum ?
4. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, um útrokningar eru gjørdar um, hvat hetta kemur at merkja fyri brúkaran av elorku ?

Viðmerkingar:
Í røðu síni undir viðgerðini av frágreiðing løgmans á ólavsøku vísti landsstýrismaðurin á, at semja var millum SEV og Kommunufelagið um broytingar í bygnaðinum í SEV.

Í miðlunum er røðan hjá landsstýrismanninum endurgivin soleiðis:
"Í stuttum snýr semjan seg um, at net- og skipanarberandi tænastur framhaldandi verða skipaðar og riknar í lutafelagnum SEV. Tað vil siga, at tað sum tryggjar javna streymstyrki – sum til dømis dieselverk, vatnorkuverk og pumpuskipan, verður partur av SEV, meðan SEV ikki verður partur av varandi orkuframleiðsluni – sum fyrst og fremst verður vindmyllur"

Hetta merkir at SEV frameftir ikki kann bjóðað uppá vindorkuútbygging.

Neyðugt er at fáa greiðu á, hvat landsstýrið ætlar í hesum álvarsmáli, og tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 5. august 2021

Sirið Stenberg